HOFF STOFF

# Galladøgverði í No



Guðrun og Guðrun og Borgný Dam Patursson stóðu fyri at sýna klæðir fram. Tær ganga báðar heilt nýggjar leiðir, men hava tó røtur í tí føroyska, við tað, at tær báðar arbeiða nógv við ull og tógvi.

*Orð: Eydna Skaale*
*Myndir: Bárður Lydersen*

Mánakvøldið var løgmaður vertur við ein stóran galladøgverða, sum varð hildin í Norðurlandahúsinum. Áðrenn døgverðan var konsert og mótasýning, og eftir døgverðan varð eisini farið upp á gólv.



*Í taluni, sum drotningin helt i Norðurlandahúsinum, var ein stórur partur á føroyskum.*



Eivør Pálsdóttir var sum altíð sera bergtakandi. Hon vísti hví hon hevur ferð eftir ferð fær virðislønir og góð skoðsmál uttanlands. Til sangin um lítlusystrarnar Elisabet og Elinborg fekk hon tær báðar at hjálpa sær at syngja.

## Deja vu

Deja Vu vóru eisini bidnir um at spæla á konsertini fyri døgverðan. Teir spældu fýra løg, tvey hjá Flóvini Viderø og tvey hjá Líggjasi Olsen.

Teir viðgingu, at teir høvdu hugsað væl um framførsluna.

– Vit vita, at krúnprinsinum dámar væl rocktónleik, so tí royndu vit at taka tveir relativt villar sangir, hóast meginparturin av áhoyrarunum kanska vóru í eldra endanum. Men vit høvdu so eisini tveir friðaligar sangir, greiða teir frá.

Spurdir, um tað var nakað serligt at framføra fyri kongsfamiljuni, svara teir, at tað hugsaðu teir mest um frammanundan.

– Tá vit komu á pallin hugsaðu vit mest um, at tað var ein fullur salur av fólki, og at tey øll skuldu hava eina góða uppliving. Undir sjálvari konsertini hugsaðu vit ikki stórvegis um tey kongaligu, greiða teir frá.

Teir siga, at teir ikki sóu tey kongaligu, hóast tey sótu á fremsta bonki, tí ljósið á pallinum var so sterkt.

– Vit sóu ikki hvussu tey reageraðu uppá tónleikin, men vit vóna, at tey hugnaðu sær, siga teir at enda.

